LÍF legði HB afturum

2. deild: Nýggja venjaraparið í Leirvík fekk sín fyrsta sigur til høldar móti HB, sum nú liggur til at flyta niður

Endiliga fekk LÍF eitt sindur av glið á, og við sigrinum togaðu teir seg upp um HB á stigatalvuni

LÍF-HB 2-1 (0-0)

Stefan í Skorini

Fyri fyrstu ferð í sjey dystum kundi LÍF fegnast um trý stig eftir loknan dyst. Ikki síðan leirvíkingar vunnu á KÍ 10. juni, er tað eydnast teimum at fáa trý stig.

Stigini móti HB vóru eisini sera kærkomin tí niðurflytingin andaði teir í nakkan. Við hesum sigrinum hava teir lagt HB afturum seg, og nú eru leiklutirnir býttir um. HB er nú á næstniðasta plássi og LÍF eitt omanfyri. Hetta var eisini fyrsti sigurin hjá venjarunum Jógvan Júst Olsen og Bergi Vatnhamar, sum sóu lið sítt vinna 2-1.

LÍF var betra liðið allan dystin og vísti nógv meira vilja at vinna enn havnarmenninir, sum hinvegin ikki komu fram til teir stóru møguleikarnar. LÍF hevði eisini rættuliga nógvar møguleikar gjøgnum dystin, men einki bar til, tí teir vóru sum gandaðir framanfyri málinum.

Kanska var tað tí at HB hevði garvaða Kaj Leo Johannesen í málinum, og øll vita, at dugur var í honum, tá hann spældi á 1. liði hjá HB. Kaj Leo hevði fleiri framúr góðar bjargingar, og fleiri ferðir komu LÍF-arar púra leysir, men hann stóð sum ein múrur. Eisini vóru royndir á træverkið, sum tó fóru útaftur í spælið.

Tá bara fimm minuttir vóru eftir, bragdaði endiliga hjá heimaliðnum. Eitt av teimum mongu skotunum á HB málið varð bjargað av Kaj Leo, men Jonhard Høgnesen var fyrstur á bóltinum, tá hann datt útaftur, og hann kundi róliga leggja LÍF framum. Lítið av tíð var eftir, og kanska gjørdust leirvíkingar eitt sindur bleytir í knøunum, tí minuttin eftir fyrsta málið javnar HB.

Florin Mihaescu spældi ikki í seinasta dystinum hjá HB í 1. deild, so hann kundi vera við í Leirvík. Hann dróg framvið fleiri spælarum, og eftir at hava spælt banda við Gunnar Mohr stóð hann leysur við málverjanum og skoraði. Hetta var ein av teimum heilt fáu møguleikunum hjá HB í dystinum. 1-1, og tað sá út til, at LÍF hevði tveitt sigurin burtur.

Heimaliðið hevði tó eitt sindur av orku eftir til at skora avgerandi málið. Pólverjin Mirek Gil dróg inn í brotsteigin í vinstra borðið og legði innfyri. Har kom Signar á Reynatrøð stórleypandi og setti høvdið á bóltin, sum streyk framvið tí annars vælleikandi Kaj Leo í HB málinum.

LÍF skal enn ansa sær, tí vandin er ikki av enn. Teir hava tó góðar vónir, tí til dystin móti HB vóru fleiri menn tøkir aftur. Onkur er sloppin av við skaða, meðan aðrir eru nýggir menn á liðnum. HB hinvegin er í kreppu, tí teir nærkast enn meira botninum.

LÍF-HB 2-1 (0-0)
1-0: Jonhard Høgnesen
1-1: Florin Mihaéscu
2-1: Signar á Reynatrøð

Máltindurin

Jón Sigurð Gleðisheyg	EB/Streymur	10
Gunnar Mohr	HB	9
Heini Heinason	GÍ	8
Bárður á Lakjuni	ÍF	8
Rúni Petersen	ÍF	8
Johnny Samuelsen	B36	7
Eyðun Samuelsen	HB	7
Óli Johannesen	TB	7
Halldórur Joensen	EB/Streymur	6
Allan Michelsen	Royn	6
Birgir Jørgensen	Royn	6
Eyðun Svalbard	TB	6
Knút Vesturtún	EB/Streymur	5
Erling Fles	KÍ	5
Kristian í Vági	LÍF	5
Bergur Djurhuus	NSÍ	5
Brynleif Hansen	B36	4
Bárður Heinason	GÍ	4
Eyðolv Petersen	ÍF	4
Jóhannis Færø	KÍ	4
Petur Sjúrðarberg	LÍF	4
Bárður Dimon	TB	4
Birgir Jørgensen	TB	4
Karl Leonsson	B36	3
Tórálvur Poulsen	B36	3
Andreas Dahl	EB/Streymur	3
Finnbjørn Zachariassen	EB/Streymur	3
Jákup Martin Joensen	EB/Streymur	3
Jan Skoradal	GÍ	3
Johan Lützen	HB	3
Jógvan Arnfinn Jacobsen	ÍF	3
Fróði Jóanesarson	NSÍ	3
Johnny Skibbenæs	NSÍ	3
Dan Mortensen	TB	3
Einar Petersen	TB	3
Hallur Christiansen	TB	3
Mahei Matei	TB	3

KÍ misti leiðsluna

2. deild: Oddaliðið var heppið við at fáa eitt stig burtur úr dystinum í Klaksvík

KÍ-EB/Streymur 2-2
(0-1)

Stefan í Skorini

KÍ var á odda stutt fyri leiklok og hevði í seinna hálvleiki fleiri møguleikar at økja leiðsluna, men fimm minuttir fyri leiklok javnaði EB/Streymur til 2-2, sum var úrslitið av dystinum.

KÍ, sum lá aftast undan seinnu hálvu av kappingini, hevur seinastu umførini rættiliga vunnið seg upp á stigatalvuni, og hóast mótstøðuliðið hesaferð var oddaliðið úr Sundalagnum, stóðu teir á heimaliðnum seg væl.

Fyrri hálvleikur var tættur. EB/Streymur hevði nógv spæl fram í síðurnar, og síðani vóru høgir bóltar sendir inn til stóra Jón Sigurd Gleðisheygg, men tað var bara sjáldan, at nakar veruligur vandi stóðst av hesum. Einu ferðina kom Halldórur Joensen leysur inn í brotsteigin, men KÍ-málverjin vardi fyri

KÍ hevði onkur nask álop, men tað nærmasta teir komu at skora, var tá Eyðun Klakstein stútaði bóltin á stongina, og einu ferðina kom høvdið á málverjanum hjá EB/Streymi, Óla Christian Djurhuus, í vegin, eftir at hann hevði hálvbjargað eini skotroynd, sum klaksvíkingur fylgdi upp.

Stutt fyri hálvleik fekk fekk EB/Streymur eitt umstrítt brotsspark, eftir at linjuverjin helt, at ein KÍ-verjuspælari hevði brúkt hondina. Knút Vesturtún skjeyt brotssparkið trygt í málið til 1-0 til EB/Streym.

Kí vendi dystinum

Í seinna hálvleiki var tað heimaliðið, sum setti ferðina upp og sum stríddist sera væl. Og tað gav eisini úrslit.

Fyrst fór John Ryan til baklinjuna í vinstru, og tá hann sendi eitt flatt innlegg inn fyri málið, kappaðust málverjin, ein verjuspælari og Erling Fles um bóltin. Ein spælari hjá EB/Streymi hevði seinasta fótin á bóltinum, sum endaði í málinum.

Nakað seinni var Erling Fles fyrstur á einum innleggi úr høgru síðu, og hann stýrdi bóltin í málið til 2-1 til KÍ. Eftir hetta hevði Erling tveir góðar møguleikar afturat, men aðru ferð bjargaði Óla Christian Djurhuus sera væl, og hinu ferðina gjørdist vinkulin ov spískur.

Hesa løtuna stýrdi KÍ dystinum, men EB/Streymur kom meira við, eftir at teir vóru komnir afturum. Teir komu tó ikki til nakrar serligar kjansir, men einu ferðina mátti KÌ-málverjin bjargað einum stútara á míllinjuni.

Javnaðu at enda

Fimm minuttir fyri leiklok sendi Knút Vesturtún eitt frískpark inn fyri málið. Jón Sigurd Gleðisheygg var hægstur við aftaru stong og stútaði upp á tvørs, har púra leysi Halldórur Joensen kundi senda bóltin seinasta teinin inn í málið.

Eftir hetta stríddist heimaliðið aftur fyri at fáa mál, men tað endaði við 2-2, og tað vóru KÍ-spælararnir eitt sindur keddir um, hóast tað var besta liðið í deildini, teir spældu ímóti.

Javnleikurin hjá EB/Streymi hevði ikki tað stóra at týða, tí nærmasti kappingarneytin, TB, snávaði í sínum dysti ímóti ÍF. Tí økti EB/Streymur um leiðsluna við einum stigi.

KÍ hevur í seinnu hálvu fingið góð úrslit, og tað er ilt at ímynda sær, at liðið aftur kann koma í niðurflytingarvanda, so leingi spælið er so gott. Men næsta vikuskiftið fer liðið at svíða fyri, at 1. lið hjá KÍ hevur trý leikbann.

KÍ-EB/Streymur 2-2 (0-1)
0-1: Knút Vesturtún (br.)
1-1: Erling Fles
2-1: Erling Fles
2-2: Halldórur Joensen

Støðan, 2. deild menn

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	EB/Str.	14	9	-	3	-	2	39	19	20	30
2	TB	14	8	-	2	-	4	43	35	8	26
3	ÍF	14	6	-	6	-	2	31	18	13	24
4	B36	14	6	-	2	-	6	30	28	2	20
5	NSÍ	14	6	-	2	-	6	23	24	-1	20
6	GÍ	14	5	-	4	-	5	25	27	-2	19
7	KÍ	14	4	-	4	-	6	21	29	-8	16
8	LÍF	14	4	-	3	-	7	17	23	-6	15
9	HB	14	4	-	1	-	9	33	45	-12	13
10	Royn	14	2	-	5	-	7	15	29	-14	11

ÍF hevur enn ein møguleika

2. deild: Við sigrinum á TB suðuri á Tvøroyri er ÍF enn við í stríðnum um uppflytingina

Stefan í Skorini

Undan dystinum móti ÍF høvdu tvørámenn bara tapt ein av teimum seks dystunum á heimavølli og vunnið hinar. Seinast teir vóru heima á Sevmýri vunnu teir heili 6-1 á B36.

Hesuferð var ÍF, sum ongantíð hevur tapt á útivølli í ár, á vitjan, og tað var óvæntað, at fuglfirðingar fóru norður aftur við øllum trimum stigunum. 3-1 var støðan, tá dómarin bríkskaði av, men í hálveikinum stóð á jøvnum 1-1.

Frá byrjan av var greitt, at ÍF mest lúrdi uppá snarálop, og tí hevði TB bóltin meira. Hóast leikliga yvirvág, so hevði TB trupult við at skapa nakrar veruligar málmøguleikar, og ÍF var vandamiklari frammanfyri málinum og hevði fleiri møguleikar enn heimaliðið. Tí var úrslitið rættvíst, tá havt verður í huga talið av málmøguleikum, sum liðini høvdu.

TB var uttan onkrar av teirra føstu spælarum, og tí var ein av gomlu kempunum, Poul F. Joensen, aftur at síggja í stríputu TB-troyggjuni. ÍF manglaði Bárð á Lakjuni, og tað er ein stórur messum, men hann hevur ikki spælt nógv á ÍF liðnum í ár.

Kontramál

Fyrsta málinum í hjá ÍF stóð eldri bróðir Bárð fyri. Høgni á Lakjuni hevði seinasta fótin á einum innleggi úr høgru frá Hergeiri Eldevig, eftir at hesin mestsum hevði runnið longdina á vøllinum. Verjan fekk fatur á bóltinum, og so gekk tað skjótt frameftir. Størsti parturin av ÍF liðnum aftanfyri miðjuna, tá málið varð skotið.

Frá klaraði tó at javna fyri steðgin. Jón Tórur Holm gjørdist púra fríur og lobbaði uppum málverjan til 1-1. Fuglfirðingar vóru í øðini um, at linjuverjin ikki hevði flaggið uppi, tí teir mettu, at Jón Tórur var klárt rangstaddur. Dómarin lat málið standa, og hetta var eisini støðan við steðgin.

Tað gekk leingi áðrenn ÍF legði seg framum aftur, og aftur var tað eftir eitt snarálop. Hergeir Eldevig hevði eisini stóran lut í hesum. Hann legði innfyri úr høgru, og Eyðolvur Petersen skeyt í netið til 2-1. Mortan Thomsen sló sigurin fastan, tá hann skallaði bóltin málið. Aftur var tað innlegg úr høgru eftir snarálop.

Taktikkurin, sum Petur Mohr legði undan dystinum, eydnaðist avbera væl, og ÍF er nú við aftur í stríðnum um uppflyting. Tó hava teir eina sera torføra skrá í teimum fýra dystunum, sum eftir eru. NSÍ og EB/Streym á útivølli eru kanska teir torførastu dystirnir á árinum, men hinvegin hava teir HB og Royn, sum eru niðast, á heimavølli.

Tað verður torført hjá TB at røkka fremsta plássinum, men nú er mest umráðandi at halda fast um annað plássið, sum gevur teimum møguleika at spæla móti næstniðasta liðnum í 1. deild.

TB-Í F 1-3 (1-1)
0-1: Høgni á Lakjuni
1-1: Jón Tórur Holm
1-2: Eyðolvur Petersen
1-3: Mortan Thomsen

Heini var í essinum

2. deild: GÍ tók sær veruliga av løttum ímóti hvalbingum, sum fóru heimaftur við einum 5-1 tapi

GÍ-Royn 5-1 (3-0)

Stefan í Skorini

Fýra ferðir var Heini Heinason á rætta staðnum móti Royn í Sarpigerði. Hann skeyt tvey tey fyrstu og tvey tey síðstu málini. Inn ímillum slapp Áslakkur Nesá við einum máli, og Allan Michelsen pyntaði eitt sindur um úrslitið ímóti endanum av dystinum.

Eftir fyrsta korterið var als ikki líkt til, at GÍ fór at vinna so sannførandi. Royn sá út til at vilja nakað og var væl við í dystinum, men so rapaði korthúsið. Innanfyri eini fimm minuttir miðskeiðis í fyrra hálvleiki hevði GÍ skorað trý mál, og so var dystuin í roynd og veru avgjørdur.

Tað var fyrst og fremst Heini Heinason, sum hevði stillað kanonina rætt inn henda dagin. Hann legði fyri við tveimum málum. Fyrstu tvey málini líktust hvørjum øðrum, har hann var fríur við málverjanum hjá Royn og fór framvið honum.

Áslakkur Nesá slapp eisini uppí part. GÍ miðvøllurin vinnur bóltin og Áslakkur Nesá dregur á skrá inn móti brotsteiginum, har hann lobbar bóltin uppum málverjan til 3-0. Trý skjót mál innan stutt tíðarskeið avgjørdi dystin. Hvalbingar gjørdu lítið um seg eftir hetta, og sóu út til at hava góðtikið eitt tap.

Í seinna hálvleiki tók Heini afturí aftur, har hann hevði slept. Tað fjórða málið hjá GÍ var eitt vakurt og stuttligt mál. Heini Heinason dróg við bóltinum heilt inn móti málteiginum, har hann snýtti bæði málverjan og verjuspælarar, áðrenn hann nakað frekt legði bóltin í netið við hælinum. Seinasta málinum stóð Heini eisini fyri. Hann verður spældur inni í brotsteiginum, og skotið fór undir málverjan, sum heili fimm ferðir mátti í málið eftir kúluni.

Allan Michelsen fekk seinasta orðið í dystinum, tá hann hevði fótin á bóltinum inni í brotsteiginum eftir eitt lítið trunkaspæl. Hvalbingar vístu tó ongan vilja at vinna, og teir liggja nú einsamallir í botninum við tveimum stigum upp til nærmasta kappingarneyta. Royn hevur eisini torfør mótstøðulið í teimum seinastu fýra dystunum, har teir bæði skulu til Fuglafjarðar og Tvøroyri, so útlitini eru ikki tey bestu. GÍ kann nú harafturímóti anda lættari, tí vandin fyri niðurflyting er mestsum av á hesum sinni.

GÍ-Royn 5-1 (3-0)
1-0: Heini Heinason
2-0: Heini Heinason
3-0: Áslakkur Nesá
4-0: Heini Heinason
5-0: Heini Heinason
5-1: Allan Michelsen

www.sosialurin.fo

B36 hevði møguleikan

2. deild: NSÍ hevði hepni við sær, tá B36 brendi brotsspark stutt fyri leiklok, tá støðan enn var 2-1

B36-NSÍ 1-3 (0-1)

Jákup Mørk

B36 hevði eftir 4-1 sigurin á ÍF fyri viku síðani møguleikan at vinna heiðursmerki í ár, men nú sær tað alt meira svart út fyri árstalsfelagið úr Havn. NSÍ tók seg hinvegin fram á sama stigatal sum B36 við hesum sigrinum.

Eftir fyrstu løtuna var líkt til, at B36 ætlaði sær at halda fram, har slept varð í Fuglafirði, men so kom NSÍ meira inn í dystin og var vandamiklari í fyrra hálvleiki. Serliga var Eddie Mikkelsen torførur at hava tamarhald á, og gav hann serliga fyri steðgin verjuni hjá b36 trupulleikar.

Fyrsta málið kom miðskeiðis í fyrra hálvleiki. B36 verjan fær ikki beint bóltin burtur, og hann verður sendur hart og flatt innfyri, har Fróði Jóannesarson hevur eina langa tá á bóltinum, sum fer í meskarnar aftanfyri málverjan. Hetta kom sum ein skelkur fyri heimaliðið, og teir reistust ikki aftur fyri steðgin.

Tá liðini komu útaftur var Tórálvur Poulsen komin á vøllin fyri at fáa eitt sindur meira bit í álopið, og tað eydnaðist eisini. Men tað var tó NSÍ, sum økti um leiðsluna. Johnny Skibenæs gjørdist leysur, og hann rundaði málverjan, og so var støðan 2-0 til gestirnar.

B36 menti seg tó, sum seinni hálvleikur leið, og fleiri málmøguleikar spurdust burturúr. Serliga var tað Tórálvur Poulsen, sum gav NSÍ verjuni nakað at hugsa um. Einki spurdist burturúr beinanvegin, men so minkaði Tórálvur um munin. Hann stóð millum fleiri NSÍ-arar í brotsteiginum og fekk tánna á bóltin, sum trillaði spakuliga um málstrikuna.

Hetta setti ferð á heimaliðið, sum nú legði trýst á NSÍ málið. Teir fingu eisini ein gyltan møguleika at fáa útjavnandi málið, tá dómarin helt, at ein NSÍ-ari hevði brotið lógina inni í brotsteiginum. Karl Leonson var settur at skjóta, men hann langaði skotið á tvørstongina og himmalhøgt upp í loft.

Eftir misnýtta brotssparkið økti NSÍ ístaðin í hinum endanum. NSÍ fer í snarálop, meðan B36 spælararnir enn standa og iðra seg um misnýtta brotssparkið. NSÍ kemur í yvirtal, og tað endar við, at Ken Nónklett verður spældur leysur. Hann dregur einaferð, og skotið brestir í stongina og inn.

3-1 til NSÍ, sum nú hevur fingið B36 aftur á stigatalvuni. Hesi bæði liðini hava nú lítlan møguleika fyri heiðursmerkjum, men um NSÍ vinnur á heimavølli móti ÍF næsta vikuskiftið, so er møguleikin aftur har.

B36-NSÍ 1-3 (0-1)
0-1: Fróði Jóanesarson
0-2: Johnny Skibenæs
1-2: Tórálvur Poulsen
1-3: Ken Nónklett

Við 12. Manni til Zurich

Flogið verður úr Vágum við Atlantic Airways tann 03. oktober kl. 11:00 til Kastrup. Bussurin heintar okkum í Kastrup og koyrir beinleiðis til Zurich, har vit koma um morgunin tann 04. oktober, vit hava hotelli frá kl. 12:00.

Gist verður á einum trý-stjørnaðum hotelli beint uttan fyri býin. Vit koma eisini at hava bussin nakað til taks meðan gist verður í Zurich.

Tann 08. oktober verður farið heimaftur við sama bussi, har koyrt verður um kvøldið. Heimferðin er við Atlantic Airways úr Kastrup til Vágar tann 09. oktober kl 15:15.

Bussurin er ein modernaður sovibussur við video og WC.

Kostnaður - fyri hvønn **4.950,-**

Íroknað er flogferð Vágar-Kastrup-Vágar, ferðaavgjøld, bussur í 7 dagar við øllum avgjøldum, atgongumerki til dystin og gisting í dupultkamari í 4 nætur við morgunmati. (sovið verður tvær nætur í bussinum, tá er morgunmaturin ikki íroknaður).

Avsláttur fyri tey, ið koma við í Kastrup er DKK 2.100,-

Tað er MB-Tours, ið samskipar ferðina fyri 12. mann. Seinasta freist at tekna seg er

hósdagin 7. september

hjá MB-Tours, tel 32 21 21.

12. MAÐUR FAROESE FOOTBALL SUPPORTERS